Bjørt Samuelsen
Kristina Háfoss
Høgni Hoydal
Sirið Stenberg
Beinta Løwe Jacobsen
Hervør Pálsdóttir
vegna Tjóðveldi

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um at endurnýggja strandfaraflotan

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um bygging av fýra ferjum til Strandfaraskip Landsins og umbygging av eini verandi ferju.
Stk. 2. Byggiútreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 330 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2026.

Almennar viðmerkingar
Tíðarhóskandi ferðasamband til oyggjarnar uttan vegasamband er bráðneyðugt, og tí eiga flokkarnir á tingi at ganga saman um eina greiða ætlan fyri stigvísa endurnýggjan av strandfaraflotanum. Fyri 295-330 mió. kr., skift á nøkur ár, ber til at endurnýggja allan flotan. Ætlanin eigur at byggja á breiða politiska semju, ið røkkur longri enn eitt valskeið, soleiðis at greiða ætlanin kann fylgjast uttan mun til, hvør samgongan er. Júst sum gjørt hevur verið við undirsjóvartunlarnar.

Føroyar eru eitt oyggjaland, og gott dagligt ferðasamband er avgerandi, skulu treytirnar fyri at virka og liva verða javnsettar kring landið alt. Eitt dagført samband er somuleiðis ein fyritreyt fyri, at øll øki í landinum fáa lut í framburðinum og fyri, at fólk framhaldandi velja at búgva, liva og virka í øllum oyggjunum.

85% av fólkinum hevur í dag fast samband, og landið hevur gjørt stórar íløgur í vegir, tunlar, brýr og byrgingar fyri at binda saman oyggjarnar. Eysturoyartunnilin lat fyri stuttum upp, og um góð tvey ár verður koyrandi til Sandoynna. Hetta áleggur politisku skipanini eisini at tryggja tíðarhóskandi samband sjóvegis til oyggjarnar, sum eru uttan vegasamband. Í undanfarnu samgongu varð farið undir at byggja havrannsóknarskip og eitt avloysaraskip til Strandferðsluna. Erla Kongsdóttir er farin í sigling, og tí eiga vit beinanvegin at fara undir at endurnýggja strandfaraflotan. Í hesi samgonguni er eitt eyka skip til flutning av farmi keypt til sandoyarleiðina, men eisini hetta skip er gamalt.

Borgarar í oyggjunum uttan vegasamband eiga at vita, nær tey kunnu vænta sær nýtt skip. Er undirtøka fyri at seta 30 mió. kr. av í ár og 60 mió. kr. av árliga komandi fimm árini, kann allur flotin endurnýggjast uppá seks ár. Endurnýggjanin kann gerast í hesi raðfylgju:

- 90-100 mió. kr. til eitt nýtt nólsoyarskip.
- 45-50 mió. kr. til eitt nýtt skip til Fugloyar/Svínoyar.
- 90-100 mió. kr. til eina nýggja kalsoyarferju.
- 45-50 mió. kr. til eina nýggja skúvoyarferju.
- 25-30 mió. kr. til at umbyggja Sam fyri, soleiðis at hann kann verða tað farmaskipið, sum SSL manglar til tær smærru oyggjarnar.

Teistin verður ikki mettur at vera egnaður at seta inn á øðrum oyggjarutum, men kann seljast, tá koyrandi verður til Sandoynna í 2023.

Samstundis má loysn finnast til tær leiðirnar, ið ikki hava nøktandi samband í dag. Sum dømi kann nevnast Mykines, har ferðasambandið ikki hevur fylgt við tíðini yvirhøvur, og ikki livir upp til tørvin hjá fastbúgvandi og vinnu, herundir ferðavinnu í oynni. Hetta er einasta leið, ið er útveitt. Tað er langt frá ein nóg góð tænasta, at siglt einans verður stutta summarskeiðið, og má siglingin leingjast so langt, sum ráðiligt er at sigla fyri veður.

Arbeiðast má samstundis fyri, at breið politisk undirtøka verður fyri einum fíggingarleisti fyri Suðuroyartunnilin, so farast kann undir hesa farleið, ið er avgerandi fyri framtíðina hjá Suðuroynni. Av tí at fyrireikingarnar til Suðuroyartunnilin eru farnar í gongd, verður ikki

roknað við nýggjari ferju til suðuroyarleiðina. Pengar skulu tó vera tøkir til at gera allar neyðugar ábøtur á Smyril og til at leiga hóskandi avloysaraskip komandi árini, soleiðis at Suðuroynni eisini verður tryggjað tíðarhóskandi ferðasamband.

Byggjast í Føroyum
Arbeiðið at smíða nýggjar ferjur til SSL-flotan eigur í størst møguligan mun at verða gjørt í Føroyum. Nýggja havrannsóknarskipið, Jákup Sverri, telist millum heimsins fremstu av sínum slag. Bróðurparturin av arbeiðinum er gjørt í Føroyum, og júst tí at øll verkætlanin frá byrjan av varð gróðursett í og ment av dyggari fakligheit og førleikunum her heima, er úrslitið framúr gott og væl egnað til føroysk viðurskifti. Við politiskt at semjast um, at nýggju SSL-ferjurnar skulu byggjast í Føroyum, kunnu vit skapa virksemi og arbeiðspláss, menna skipasmíð, og geva oyggjabúgvum ferjur, sum er sniðgivnar og smíðaðar júst til endamálið at sigla millum oyggjarnar í Føroyum.

Sigla við varandi orku
Nýggjasta SSL-ferjan, Erla Kongsdóttir, kann sigla bæði við olju og streymi, so fyrsta stigið at umleggja til umhvørvisvinarlig skip er tikið. Nýggju ferjurnar eiga allar at verða smíðaðar soleiðis, at brennievnið í mest møguligan mun verður varandi orka – til dømis el ella vetni. Menningin á hesum øki gongur skjótt.

Í verandi langtíðarkarmi eru pengar ikki settir av til byrja at endurnýggja strandfaraflotan fyrr enn í 2025. So leingi kunnu vit ikki bíða við at fara undir at smíða nýggj skip til oyggjaleiðirnar. Við samtykt av hesum uppskoti eiga flokkarnir at semjast um at finna pening til fyrireikingar og projektering av fýra systurskipum í 2020, og seta neyðugu upphæddinar á fíggjarlógirnar fyri komandi fimm árini.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Ætlanin er at fíggja útreiðslurnar av lógini á fíggjarlógini við eykajáttan á 30 mió. kr. í ár og við 60 mió. kr. árliga árini 2022-2026. Samsvarandi hesum verður eisini lagt fram eitt uppskot um eykajáttan á 30 mió. kr. í verandi fíggjarári.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Greinin heimilar landsstýrismanninum at fara undir at endurnýggja strandfaraflotan, har fýra ferjur til oyggjaleiðir skulu verða bygdar fram til 2026, umframt at umbyggja ferjuna Sam.

Til § 2
Greinin er ein gildiskomuregla og sólseturáseting. Sostatt fer lógin úr gildi 31. desember 2026. Sólseturásetingin tekur hædd fyri, at nýggju skipini eftir ætlan verða liðug í 2026.

Á Løgtingi, 19. januar 2021

Bjørt Samuelsen	Kristina Háfoss	Høgni Hoydal
Sirið Stenberg	Beinta Løwe Jacobsen	Hervør Pálsdóttir